# SJEY MANS ARBEIÐA HJÁ ANDERSENS



**BEDING** - Vit gera at kalla alt uttan el-arbeiði, og vit ferðast út um landið at gera umvælingar og instaleringar, sigur Høgni Andersen, sum saman við trimum øðrum í familjuni eigur Sp/f Andersens Beding á Strondum

Vilmund Jacobsen

Adressan er Heygsstøð 10 á Strondum, og navnið er Sp/f Andersens Beding.

Ein vanligan dag arbeiða allir sjey menninir, sum eru í starvi hjá fyritøkuni, undir sama taki ella í umhvørvinum kring Heygsstøð. Men tað eru eisini dagar, har einir 2-3 mans fara út at gera uppgávur, sum bedingin verður biðin um at gera. Talan kann vera um ymiskar umvælingar, ísetan av motorum – ella hvs-arbeiði, sum teir á bedingini á Strondum eisini taka sær av.

- Vit kunnu taka flestu uppgávur á okkum, og verða vit bidnir, koyra vit gjarna út um landið. Tað er bara eitt, sum vit ikki gera, og tað er el-arbeiði. Slíkt lata vit aðrar um.

Tað sigur Høgni Andersen, sum saman við trimum øðrum í familjuni eigur Sp/f Andersens Beding.

- Navnið á bedingini stavar frá pápa mínum Anders, sum doyði fyri fáum árum síðan. Bedingin hevur verið í familjuni í sløk 20 ár. Í dag eru vit fýra, sum eiga 25% í part. Ein beiggi mín, sum býr í Esbjerg, eigur ¼, systir mín og maður hennara eiga ¼, bróðursonur mín, Jóhan, sum eisini arbeiðir á bedingini, eigur ¼ - og síðan eigi eg hin seinasta fjórðingin, sigur Høgni.

Tað var annars Dia Rasmussen, sum bygdi bedingina á Heygsstøð í sekstiárunum.

## Ymiskar uppgávur

Høgni Andersen heldur, at tað er ein fyrimunur í skiftandi tíðum, at arbeiðsplássið er fleksibult.

- Vit gera nógvar maskinumvælingar og motorísetingar, og vit arbeiða við rustfríum stáli, glastrevju og timbri.

Hann sigur, at sjálvandi er ein fittur partur av virkseminum hjá eini beding at taka smærri skip og bátar upp.

- Alt árið hava vit bátar og smærri skip uppi, og í flestu førum syrgja vit eisini fyri málaraarbeiðnum. Annars taka vit okkum av ymiskum umvælingum og ístandsetingum, tá biðið verður um tað. Seinnu árini hava vit eisini gjørt meiri við glasfipur enn áður, og her kunnu vit loysa flestu uppgávur, ið tørvur er á, sigur Høgni.

## Nýggir skinnarar

Soleiðis, sum sjálv bedingin er fyri beint nú, verða neyvan skip størri enn 20 tons tikin upp.

- Vit gera í løtuni klárt til at leggja nýggjar skinnarar út. Vit eiga tilfarið, sum vit skulu brúka, og ætlandi verður hetta arbeiði gjørt í næstum.

Høgni Andersen sigur, at hóast hetta arbeiði liggur fyri framman, tí neyðugt verður við betri skinnarum, er tó einki til hindurs fyri at taka eitt nú 20-tonsarar upp á verandi beding.

- Í dag arbeiða nakrir mans við at umvæla ein aliflaka, og onkur slengrikjølur skal eisini málast. Aðrir menn arbeiða her inni í smiðjuni, sigur hann.

Eitt, sum lesarin kanska ikki veit so nógv um, er, at Andersens Beding eisini ger hvs-arbeiði – ikki bara umborð á bátum og skipum, men eisini í sethúsum og bygningum.

> **...alt árið hava vit bátar og smærri skip uppi til umvælingar og upppussingar...**
>
> HØGNI ANDERSEN



*Andersens Beding umboðar Nanni Diesel motorar til bátar. Hetta eru franskir motorar, og seinastu níggju árini eru einir 70-80 motorar av hesum slag seldir í Føroyum*